# Brast inn í garðin

**Ein ungur maður er skuldsettur fyri at hava koyrt ávirkaður, eftir at hann sunnudagin misti tamarhaldið á bili sínum á Marknagilsvegnum**

FERÐSLUÓHAPP
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Klokkan 14.30 sunnudagin hendi eitt ferðsluóapp á Markangilsvegnum í Havn, beint við Dalavegin.

Ein ungur maður kom koyrandi í bili sínum, og fyri ikki at renna á ein annan bil, bremsaði hann. Hetta gjørdi, at hann misti tamarhaldið á bilinum, og bilurin varð tá slongdur inn í grótgarðin.

Maðurin fekk ongan skaða, men bilurin fór rættiliga illa.

Sambært politinum er tann ungi maðurin skuldsettur fyri at hava koyrt ávirkaður.



*Bilurin slongdist inn móti grótgarðinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Skaddi politi-bilin

**Ein maðu er skuldsettur fyri herverk og brot á politiviðtøkurnar fyri atburð sín á einum vertshúsi í Havn leygarnáttina**

ÓFRIÐUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Leygarnáttina var ófriður inni á einum vertshúsi í Havn, og politiið varð biðið um at koma eftir einum illum manni.

Maðurin var so illur í sær, at tveir duravørðar noyddust at halda honum, til politiið kom.

Maðurin sissaðist ikki so, og tá ið politistarnir skuldu koyra mannin inn í poliitbilin, gjørdi hann skaða á bilin.

Maðurin er nú skuldsettur fyri herverk og fyri at hava brotið politiviðtøkurnar.

